## Val í Suðurafrika

Alt bendir á, at ANC, sum hevur havt valdið í Suðurafrika síðani 1994, fer at varðveita valdið aftan á valið í dag. Gongst sum væntað fer ANC at vinna ein rættiliga greiðan sigur, og so verður formaðurin, Jakob Zuma, nýggjur forseti. Andstøðan hevur rikið eitt rættiliga hart valstríð og hevur millum annað víst á, at Jakob Zuma er skuldsettur fyri bæði svik og neyðtøku. Hann er kortini ongantíð dømdur. Suðurafrika er illa plágað av fátækradømi, og júst tann fátæki parturin av fólkinum metir Jakob Zuma sum teirra bjargingarmann. Sambært meiningakanningunum undan valinum fær ANC millum 60 og 66 prosent av atkvøðunum.



## Sivilfólk gíslar í Sri Lanka

Altjóða Reyði Krossur og amerikanska stjórnin hava biðið teir stríðandi partarnar í Sri Lanka hjálpa teimum mongu sivilfólkunum, sum eru innistongd í stríðsøkinum har norðuri í landinum. Í seinastuni hevur stjórnarherurin rikið teir tamilsku uppreistrarmenninar undan sær, so nú hava teir bara eitt umleið 20 ferkilometrar stórt øki eftir. Men í hesum økinum eru umleið 50.000 sivilfólk, sum ikki sleppa burtur. Stjórnin sigur, at uppreistrarmenninir brúka sivilfólkið sum livandi skjøldur ímóti stjórnarherinum. ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, hevur biðið partarnar loyva ST at senda fólk til økið at kanna viðurskiftini.

### Harðskapur móti lækna

Í aðrari ákæru játtaði hin 19 ára gamli seg sekan í at hava bukað tveir dreingir, tí ein vinmaður hansara – tann sami, sum við bilinum hjá ákærda rendi á unglingin uppi á Oyggjarvegnum – hevði sagt honum, at ein annar unglingi hevði snýtt hann í sambandi við sølu av einum bili.

Tá eg ikki visti hvør teirra tað var, sum hevði snýtt vinmannin, bukaði eg bara báðar, greiddi ákærdi frá í rættinum.

Hann hevði sligið annan so hann datt og síðani sparka hann, meðan hann bað hin leggja seg niður, áðrenn hann sparkaði henda á kroppin og í høvdið.

Í hendingini í Hamarsgøtu vildi ákærdi vera við, at tað var hin 26 ára gamli, sum »førdi ann«, hóast hesin einki hevði við málið um tær 500 krónurnar at gera, og heldur ikki hevði verið við til hendingina kvøldið fyri.

Í síðsta lagi er hin 19 ára gamli ákærdur fyri at hótta arrestlæknan eftir lívinum og fyri at hava framt harðskap móti sama.

Tað kom fram í rættinum, at hin 19 ára gamli er í viðgerð við heilivági og við samrøðum, og sambært honum sjálvum hevur hann »ongantíð havt tað betri«. Spurdur um, hvussu hann sær upp á ákærurnar nú í mun til, tá tær vórðu framdar, segði tann 19 ára gamli:

- Eg angri einki av tí, eg havi gjørt. Men eg hevði ikki funnið upp á at gjørt tað sama í dag!

Málið er fyri aftur í dag og heldur fram seinnapartin.

um úr Havn setti seg inn í bilin við ákærda, tí hesin helt fram við at verða hóttandi. Ákærdi setti fleiri ferðir fram hóttanir um at drepa løgreglumannin og lovaði at finna fram til, hvar familjan búði, tí so skuldi hann eisini drepa hana.

Á veg til Havnar stardi ákærdi í langa tíð eftir løgreglumonnunum fyri at prenta sær í sinnið, hvussu teir sóðu út, alt fyri at kunna kenna teir aftur.

Ávegis til Havnar kom ákærdi eisini við hóttanum móti einum triðja løgreglumanni, sum ikki á annan hátt var blandaður upp í málið. Ákærdi kendi eftir øllum at døma viðkomandi eins og hann visti, hvussu unnusta hansara æt. Hann greiddi ítøkiliga frá, hvussu hann suldi drepa hendan løgreglumannin, nevniliga viða at stinga ein knív í nakkan á viðkomandi.

Eisini eftir at teir vóru komnir á løgreglustøðina í Havn helt ákærdi fram við at seta fram hóttanir, bæði um at sorla og at drepa.

Báðir umrøddu løgreglumenninir kendu seg so hóttar, at teir valdu at melda málið til løgregluna.

Hetta var ikki bara fullamannasnakk. Vit kendu hetta sum reellar hóttanir, vóru báðir løgreglumenninir samdir um.

Annar teirra er síðani komin á kriminaldeildina at arbeiða, og hevur tí síðani havt rættiliga fitt við ákærda at gera.

- Eg havi bara hesa einu ferðina sæð ákærda ført seg fram soleiðis. Eg havi havt nógv við hann at gera síðani, og kann bara bera honum alt gott, segði annar av løgreglumonnunum í rættinum í morgun.

# Langir syndaregistarar

**Teir báðir ungu menninir, sum í gjár og í dag standa ákærdir í Føroya Rætti fyri eldáseting, hava hvør sín langa syndaregistar, og tí tekur sakarmálið fleiri dagar. Báðir møta álvarsomum ákærum**




*Hóast langar syndaregistarar, er eldáseting í Hamarsgøtu einasta málið, har teir báðir eru samákærdir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Umframt ákærurnar um eldáseting, skulu teir báðir ungu menninir eisini svara fyri ákærum um ávikavist deyðshóttan móti løgreglumonnum og móti arresthúslækna.

Tann eldri er ein 26 ára gamal maður, ið ikki kendi yngra mannin nakað soleiðis undan eldásetingini 12. november í fjør.

Teir hittust saman við onkrum felags vini í Mimi hetta kvøldið, og tann yngri, 19-ára gamli maðurin hevði hoyrt so mikið um hin eldra, at hann var góður at hava við, tá onkur »avstraffing« skuldi fara fram.

Inni í Mimir fekk tann 19 ára gamli ein knív, og saman skuldu teir báðir so hevna eina hending, sum var farin fram kvøldið fyri, tá hesin felags vinurin hevði fingið ein saks stungnan í pannuna.

Tann 26-ára gamli var tann fyrri avhoyrdi, og umframt ákæruna um eldsásetingina, stóð hann ákærdur fyri fýra onnur lógarbrot, millum annað fyri at hava sett fram deyðshóttan móti í minsta lagi einum løgreglumanni.

Hetta hendi eftir at hann og ein annar vinmaður høvdu stolið ein bil við Norðurlandahúsið í mai í fjør og síðani vóru farnir biltúr vestur í Vágar. Vinmaðurin hevði koyrt, men vesturi í Miðvági hevði ákærdi koyrt bilin nakrar metrar og tá rent á bæði eini hús og ein garð.

Løgreglan kom á staðið, og alt gekk friðarliga fyri seg inntil ein bilur við tveimum løgreglumonnum kom úr Havn eftir ákærda. Tá var rok komið í, og undir túrinum aftur til Havnar hevði ákærdi hótt í minsta lagi ein løgreglumann eftir lívinum. Hann noktaði tó fyri at hava hótt familjuna hjá løgreglumanninum eisini.

### Einki Guðs lamb

Tvær aðrar ákærur høvdu eisini við sama kvøld at gera, onnur var fyri at stjala áðurnevnda bil, og hin var fyri herverk móti einum bili og einari gravkúgv, sum stóðu ávikavist við og nærhendis Hotel Vágum.

Fimta ákæran móti hesum 26-ára gamla var fyri eldáseting inni í arrestini, eftir at han varð handtikin og sat í varðhaldi, meðan ákærurnar vórðu nærri kannaðar.

Hesum játtaði ákærdi seg sekan í, men segði, at hetta var hent eftir at hann hevði fingið at vita, at løgreglan arbeiddi við at skuldseta hann í málinum um hóttanina móti løgreglumanninum. Hann helt, at tað var langt úti, at tað næstan skuldi ganga eitt ár, áðrenn hesar skuldsetingarnar vórðu settar fram móti honum.

Eldurin í arrestini var tó ikki álvarsligur. Talan var um eldáseting á eitt dagblað, og tað fekk starvsfólkið skjótt bilbukt við. Ákærin vísti tó í álvaran í, at eitt pinkubarn – sum ein av teimum kvinnuligu innsettu átti – sat í einum barnastóli tíggju metrar frá brennandi dagblaðnum.

Tann 19-ára gamli er eftir øllum at døma heldur einki Guðs lamb. Hansara ákærur umfata eisini fýra aðrar hendingar umframt eldásetingina á sethúsini í Hamarsgøtu.

Hann var ein av teimum, sum eru ákærdir fyri at hava koyrt ein ungan mann niður við bili uppi á Oyggjarvegnum. Hendan hendingin fór fram bert tríggjar dagar áðrenn eldásetingina á sethúsini í Hamarsgøtu.

Hann og ein vinmaður høvdu lokkað ella noytt ein triðja ungling at eta sovitablettir. Hesin unglingin skuldi hava ein avsmurning, tí hann skuldi hava verið í so næskur móti einari gentu. Alt hetta endaði við, at unglingin fór at renna undan við hinum báðum eftir sær. Annar í bili. Tað endaði við, at unglingin varð ákoyrdur og slongdur einar seks metrar viður í grøvina við síðuna av vegnum.

Hin ákærdi í hesum málinum er dømdur í aðrari rættarsak.

### Sparkaði læknan

Tvær aðrar ákærur snúðu seg um harðskap. Hin fyrra tá hann mest sum ómotiverað bukaði tveir dreingir, tí ein vinmaður hansara hevði sagt, at annar teirra hevði snýtt hann. Ákærdi hevði ikki fingið rættiliga við, júst hvat tað snúði seg um, men hann kendi tað sum sína skyldu at vera revsunnar eingil fyri vinmannin, og tá hann ikki rættiliga hevði fingið við, hvør hin seki var, bant hann bara um heilan fingur og bukaði báðar.

Triðja ákæran er fyri harðskap móti tí, sum búði í húsunum í Hamarsgøtu. Genta til henda hevði gjøgnum leigaran í Hamarsgøtu keypt tvey gramm av hassj frá ákærda, sum hesin hevði latið gentuni. Men hóast tað sostatt var gentan, ið hevði keypt hassjið, metti ákærdi, at órættaði skuldi gjalda, tí tað var hann, sum hevði biðið seg selt hassjið av fyrstan tíð. Talan var um 500 krónur.

Tað var hendan hending, sum kvøldið eftir førdi til eldásetingina. Ákærdi var farin við einum vinmanni út í Hamarsgøtu at krevja hesar 500 krónurnar inn, men tá órættaði ikki vildi gjalda, fóru teir at takast. Hetta endaði við, at órættaði rendi ein havasaks í pannuna á vinmanni tann ákærda.

Tað var hetta, sum tann ákærdi saman við 26-ára gamla manninum skuldi hevna hetta kvøldið 12. november 2008, olg sum endaði við eldáseting á sethúsini á Hamarsgøtu 2. Og sum hjá 19 ára gamla var fjóðra ákæran.

Í fimta lagi var hesin unglingin ákærdur fyria t hava framt harðskap móti læknanum í arrestini í februar í ár. Hetta hendi eftir at læknin skuldi kanna ákærda, og hesin gjørdist í øðini, tí hann helt, at læknin ætlaði at taka heilivág, sum hann tók, frá sær.

Tað endaði við, at ákærdi fór aftan á læknanum og tá hesin var á veg niður gjøgnum trappurnar, sparkaði ákærdi læknan í ryggin so hesin fall.

- Hetta er bara ein forsmakkur upp á tað, sum kemur, rópti ákærdi eftir læknanum.

Í báðum førum verða ákærurnar reistar undir einum, og rættarmálið varar í minsta lagi tveir dagar aftrat.